bústa∂ir
Føroya bústaðafelag

Tórshavn t. 11. desember 2020

Til Almannamálaráðið

Trivnaðarnevnd Føroya Løgtings

Fólkaflokkin

Sambandsflokkin

Javnaðarflokkin

Sjálvstýri

Tjóðveldi

Framsókn

Miðflokkin

**Uppískoyti til hoyringsskriv um fíggingarheimild til Húsalánsgrunnin**

Við tað at uppskotið, sum verður lagt fyri Føroya Løgting í dag tann 11. desember, er nógv broytt samanborið við upprunaliga uppskotið frá 26. juni, halda stýri og stjórn fyri Húsalánsgrunnin, at tað er neyðugt at koma við einum ískoyti til hoyringsskrivið, dagsett tann 27. juli 2020.

Viðvíkjandi Uppskoti til Løgtingslóg um broyting í Løgtingslóg um Húsalánsgrunn – LM-064/2020

(Mál nr. 20/00596 – Almannamálaráðið – eftir hetta nevnt Lógaruppskot L-HGR-2).

**Samanumtøka**

- Lógaruppskotið er ikki í samsvar við lógargrundarlagið undir Húsalánsgrunninum og uppskotið er heldur ikki í samsvar við Bústaðapolitikk Landsins.
- Býtið av lánsheimildini er ikki í samsvar við metta tørvin á leigubústøðum, sambært bíðilistanum hjá Bústaðir, og lánsheimildin er heldur ikki í samsvar við ynskini um, hvar fólk á bíðilistanum vilja búgva.
- Bústaðir - Føroya Bústaðafelag - sum skuldi vera eitt amboð í almenna bústaðapolitikkinum - verður veingjaskert, um hetta lógaruppskotið verður samtykt óbroytt. Tað er m.a. ikki ein góð loysn at flyta uppgávur, sum vanliga verða fíggjaðar á fíggjarlógini, til Bústaðir.
- At landsstýrismðurin skal góðkenna staðsetingar og málbólkar, og í kunngerð áseta reglur fyri verkætlanir hjá Bústøðum, er ikki í samsvar við armslongdarprinsippið.
- Tað er ikki neyðugt at gera nýggjar kunngerðir fyri tað virksemið, sum Bústaðir hava arbeitt við í átta ár, og sum hevur eydnast væl. At gera nýggjar kunngerðir seinkar bara tilgongdini.

Stýrið fyri Húsalánsgrunnin - Bústaðir - fegnast yvirskipað um, at lógaruppskotið um at veita Bústøðum fíggingarheimild nú er lagt fyri løgtingið.

Bústaðir fingu lógaruppskotið til hoyringar tann 26. juni 2020. Av tí at stórur munur er á tí fyrra lógaruppskotinum, og uppskotinum, sum nú er lagt fyri løgtingið, kalla vit tað fyrra L-HGR-1.

Til tað fyrra, L-HGR-1, lótu Bústaðir inn hoyringssvar tann 27. juli 2020. Í hoyringssvarinum tóku Bústaðir ikki undir við lánsheimildini, sum var 400 mió.kr. Upphæddin var ov lítil til mongu endamálini, og býtið, sum skotið varð upp, var heldur ikki í samljóð við Bústaðarpolitikk Landsins frá 2012 og við bíðilistan hjá Bústøðum. Býtið í seinra uppskotinum, L-HGR-2, er tó tað sama, og harafturat er ymiskt komið afturat. Bústaðir seta spurnartekin við skynsemið í hesum í broytta uppskotinum.

Bústaðir vísa framvegis til upprunaliga hoyringssvarið, dagfest tann 27. juli 2020.

Niðan fyri verða tey viðurskifti, sum eru komin afturat í L-HGR-2, viðgjørd.

**1. Ad. § 2 frá trimum til fimm stýrislimir**

Bústaðir halda ikki, at grundgevingin at hækka talið á stýrislimum úr trimum upp í fimm, er nóg góð. Bústaðir hava í dag eitt gott og tætt samstarv við m.a. Almannamálaráðið, Almannaverkið, fleiri áhugafeløg og kommunurnar. Tí er ikki neyðugt, at servitan innan øll øki eisini er umboðað í stýrinum.

**2. Ad. § 6 a. um ráðgeving**

Upprunauppskotið, L-HGR-1, nevndi "Ráðgeving um alternativar byggi- og fíggingarhættir". Í seinna uppskotinum, L-HGR-2, er orðið "fíggingarhættir" strikað. Orsøkin er, at fíggingarhættir kunnu onnur ráðgeva um. Tað er eitt mistak.

Húsalánsgrunnurin er lánsveitari til m.a. lutaíbúðafeløg og sjálvsognarstovnar. Tá er ráðgeving eitt krav.

Harumframt er lógaruppskotið, sum so, ein staðfesting av, at Húsalánsgrunnurin skal arbeiða fyri at fjøltátta bústaðaútboðið við m.a. lutaíbúðum. Lutaíbúðir og lutaíbúðafeløg eru í sær sjálvum "bert" ein fíggingarháttur - ein alternativur fíggingarháttur mótvegis eigarabústøðum øðrumegin og leigubústøðum hinumegin. Tískil ber ikki til at viðgera ella ráðgeva um lutaíbúðir uttan at tosað verður um fígging eisini.

**3. Ad. § 8 c. Um býti av teimum 450 mió. kr.**

Býtið av teimum 450 mió. kr. er ikki í samsvar við Bústaðapolitikk Landsins og bíðilistan hjá Bústøðum.

Lógaruppskotið miðar ímóti, at 200 mió. kr. skulu fíggja bústaðaverkætlanir til serligar málbólkar. Í hesum føri skal Húsalánsgrunnurin útvega fígging til eitt nú barnaheim ella barnabústovnar. Vanliga eru hetta verkætlanir, sum beinleiðis verða fíggjaðar á fíggjarlógini.

Afturat hesum miðar uppskotið eftir, at byggjast kunnu leigubústaðir fyri 125 mió. kr. í økjum í landinum, har grundarlag ikki er fyri kapping. Og byggjast kunnu bústaðir fyri 125 mió. kr. í økjum, har grundarlag er fyri kapping, tá kunngerð er gjørd um hesa bygging. Tað er ikki neyðugt at gera eina kunngerð afturat um tað virksemið, sum Bústaðir hava arbeitt við í átta 8 ár, og sum er eydnast væl. (Sí kunngerð nr. 2, frá 10. januar 2012)

Á bíðilistanum hjá Bústøðum eru 2.500 limir. 85 prosent vilja hava ein bústað í Suðurstreymoy. Fyri 125 mió.kr. kunnu Bústaðir í besta føri byggja umleið 70 bústaðir tey komandi árini. Hetta tal av leigubústøðum nøktar als ikki tørvin, og tað er á ein hátt at halda fólk á bíðilistanum hjá Bústøðum fyri gjøldur.

**4. Ad. § 8 d. Um at stovna partafelag til partar av virkseminum**

Bústaðir hava í fleiri førum gjørt vart við, at fyri at kunna fremja verkætlanir saman við privatum íleggjarum - og sostatt hava deildan ognarskap - má stovnurin hava loyvi til at leggja hetta virksemið í eitt partafelag. At gera eina kunngerð í hesum sambandi fer bara at seinka tilgongdina.

Bústaðir hava víst á, at neyðugt er at fáa heimild at stovna partafeløg, tí stovnurin hevur eitt ávíst handilsligt virksemi, bæði í samband við arbeiðstakarauppgávur og í samband við ráðgevingaruppgávur. Fyri at hetta virksemið ikki skal vera kappingaravlagandi er neyðugt, at virksemið verður handfarið gjøgnumskygt í einum partafelag við egnum roknskapi.

Í § 8 d. stk. 2 verður skotið upp, at lánsheimildin eisini fevnir um partafelag. Tað merkir, at lánsheimildin fyri leigubústaðabygging í økjunum, har møguleiki er fyri kapping - fyri Bústaðir einsamalt og saman við øðrum - er avmarkað til einans kr. 125 mió.kr. Tað røkkur einans til umleið 70 íbúðir. Henda ásetingin at stovna partafelag økir tískil ikki um orkuna at økja útboðið á leigubústøðum.

Tórshavn, tann 11. desember 2020

Stýri fyri Bústaðir

Jóhann Mortensen

Una Joensen

Emmy Joensen